# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 1. oktober 2009


# Skulu døma Ongland–Frakland

**Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen skulu stýra uppgerðini, tá kvinnulandsliðini hjá Onglandi og Fraklandi hittast tann 17. oktober.**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk


Talan er um dyst í undankapping til EM-endaspælið, sum verður komandi ár.

Fronsku kvinnurnar eru kanska ikki heilt á somu hæddum sum menninir, men tær verða kortini mettar at hoyra í bólkin av liðum beint undir heimstoppinum. Og millum annað taptu tær herfyri tepurt móti bæði Noreg og Týsklandi.

Ongland hevur seinnu árini spælt móti føroyska kvinnulandsliðnum, men í mun til liðið, sum hevur tikið lut í Challenge-Trophy, hevur Ongland nú funnið fleiri spælarar í bæði Danmark, Noreg og Týsklandi, ið so ella so hava ensk ættarbond, og sum tí kunnu spæla á landsliðnum. Ætlanin við hesum er at hava eitt lið, sum í 2012 kann standa seg væl á Olympisku leikunum í London. Og eitt nú vann Ongland á Finnlandi í undan-undankappingini. Finnland vann finaluna í Challenge Trophy kappingini í fjør við sigri á Føroyum.



**Í gjár fingu Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen boð um, at teir skulu til London at døma dyst millum ensku og fronsku hondbóltskvinnurnar**

# Ronaldo er pengarnar verdur

**Cristiano Ronaldo hevur higar til skúgva allan iva til viks. Í gjár skoraði hann tvær ferðir og var upphavsmaður til reytt kort og brotsspark, tá Real Madrid vann 3-0 á Marseille í Champions League-kappingini**

Stóra sensatiónin í gjárkvøldið kom annars á San Siro í Milano, har AC Milan tók ímóti FC Zürich. Á pappírinum var eingin sum helst ivi um, at dysturin skuldi enda við heimasigri, men Leonardo og hansara menn máttu ásanna, at dystir eisini skulu spælast á vøllinum, áðrenn stigin eru heima.

Longu í 10. minutti skoraði Hanni Tihinen, og ta leiðsluna helt FC Zürich fast um.

Manchester United var aftan fyri 1-0 móti Wolfsburg. Ryan Giggs javnaði, tá hann skeyt sítt mál nummar 150 fyri Manchester United, og so kundi Michael Carrick tryggja ensku meistarunum sigurin.

Og eisini Chelsea vann sín dyst. Men í løtum stóð nógv á, tá teir við einum máli frá Nicholas Anelka vunnu 1-0 á útivølli móti Apoel Nicosia.

**Mørk**

### Úrslitini í gjárkvøldið:

**Bólkur A**
Bordeaux-Maccabi Haifa 1-0
Bayern Munchen-Juventus 0-0

**Bólkur B**
CSKA Moskva-Besiktas 2-1
Manchester Utd-Wolfsburg 2-1

**Bólkur C**
AC Milan-FC Zurich 0-1
Real Madrid-Marseille 3-0

**Bólkur D**
Porto-Atlético Madrid 2-0
Apoel Nicosia-Chelsea 0-1

# Martin vann FM

**Í fyrradagin varð FM-finala í tennis spæld á tennisvøllinum í Gundadali**

Vinnarin gjørdist Martin Nolsøe Simonsen, sum basti unga Róa Agnarsson við úrslitinum 6-1 6-2. Dysturin var til tíðir væl spældur, men eisini darvaður av skiftandi veðri.

Tað var fyrsta finala hjá Róa í tennis fyri vaksin, men hóast hann vísti góðar taktir, so megnaði hann ikki av álvara at leggja fleirfaldaða føroyameistaran undir nóg stórt støðugt trýst.

Havnar Tennisfelag skipaði aftur í ár fyri FM í tennis í einmansleiki. Hóast vánaligt veður seinastu vikurnar hevur darva møguleikunum at spæla, so hava 18 luttakarar verið við til kappingina.

**Mørk**



**Martin N. Simonsen er framvegis fremsti tennisspælarin í landinum. Í finaluni basti hann Róa Agnarsson, sum soleiðis hevur vunnið silvur í bæði tennis og borðtennis**